## Málmaður spældi bakkur

Eykamálmaðurin hjá Vejle, Jimmi Klitland, royndi seg um vikuskiftið sum bakkur. Orsøkin var, at Vejle hevði so nógvar skaðar, at venjarin varð noyddur at seta málmannin á liðið. Vejle er á venjingarlegu og spældi ímóti einum úrvalsliði av Jamaica. Vejle vann dystin 4-0, so kanska var málmaðurin ikki so galið hóast alt.



## Mexico vil hava HM

Eftir at hava hýst endaspælunum í 1970 og í 1986 ætlar Mexico sær fyri triðju ferð at verða vertur fyri HM-kappingini í fótbólti. Mexicanska fótbóltssambandið váttað fríggjadagin, at tey ætla sær at søkja um vertsskapin fyri HM-endaspælið í 2018 ella í 2022. Verður Mexico valt sum vertstjóð, verður landið tað fyrsta ,sum hevur hýst trimum endaspølum. Umframt Mexico sigast Qatar, Japan, Kina, Australiga, USA, Ongland og Holland/Belgia eisini hava ætlanir um at søkja um vertsskapin.

# Torres er aftur

**Spanski skarprættarin hjá Liverpool hevur fingið stóran part av kappingarárinum oyðilagt av skaðum. Nú er hann aftur, og tað fekk Chelsea at kenna í stórdystinum sunnudagin**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Fernando Torres hevur verið uttan fyri við skaða stóran part av kappingarárinum. Sunnudagin prógvaði hann, at hann væl kann gerast avgerandi trumfurin hjá Liverpool í oddastríðnum í Premier League. Her kemur hann fram um Alex, áðrenn bólturin verður stútaðu inn til 1-0 í dystinum móti Chelsea*

*Mynd: Polfoto/AP*

Øll eygu vóru vend móti Mike Riley, sum leddi stórdystin á Anfield Road sunnudagin. Sjónvarpsmyndirnar vístu týðiliga, at Frank Lampard tók bæði bólt og mann, tá hann fór í nærdyst við Xabi Alonso hjá Liverpool, men tey fæstu mundu vænta, at reyða kortið varð tikið úr lummanum. Minst av øllum Frank Lampard, men hóast mótmælini vóru av teimum heilt stóru, so dómarin við sítt.

Undan hesum hevði Chelsea staðið ímóti einum stórum trýsti frá vertunum, og seinasta hálva tíman bara øktist hetta. Alt bendi tó á ein málleysan javnleik, sum hevði komið so sera væl við hjá oddaliðnum úr Manchester United, men el Nino – Fernando Torres – vildi tað øðrvísi.

Spanski áleyparin hjá Liverpool hevur havt sínar skaðar at dragast við hetta kappingarárið, og seinsta málið frá hansara gaggum skuldi finnast afturi í oktober mánaði.

Men tá Fabio Aurelio sendi bóltin innfyri, var Torres fyrstu á, og við høvdinum stýrdi hann bóltinum inn um stólpan.

Riley legði fimm minuttir afturat teimum 90, og tað var ikki sørt, at reyðu viðhaldsfólkini fingu nervar. Men Torres hevði veruliga goymt tað besta til seinast. Og við sínum næsta málið í dystinum sópaði hann allan iva til viks.

### United á toppinum

Sigurin bar við sær, at Liverpool enn heldur fast í vónini um at fanga Manchester United aftur.

Ensku meistararnir hava hava framúr úrslit í fleiri mánaðir, og 1-0 sigurin móti Everton var 12. Premier League dysturin á rað, har mál ikki er farið ígjøgnum hjá liðnum. Hesa ferð skuldi eitt brotsspark frá Cristiano Ronaldo til, men talan var kortini um ein sigur av teimum heilt væl uppibornu, sum vertirnir á Old Trafford vunnu sær.

Samstundis sum toppurin gerst alt greiðari, treingist í botninum. Sigurin hjá Stoke móti Manchester City lyfti uppflytararnar upp um botnstrikuna, har Blackburn, Middlesbrough og West Bromwich Albion nú mugu hyggja uppeftir. Men fjarstøðan er tó alt annað enn long. Tottenham, Newcastle, Portsmouth og Stoke hava øll bert eitt stig meira enn Blackburn, og tí bendir alt á, at tað verða teir heilt smáu marginalarnir, sum fáa avgerandi týdning, tá talt verður saman við kappingarlok.

**Premier League**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Man Utd | 23 | 16 | - | 5 | - | 2 | 40 | 10 | 30 | 53 |
| 2 Liverpool | 24 | 14 | - | 9 | - | 1 | 39 | 15 | 24 | 51 |
| 3 Chelsea | 24 | 14 | - | 6 | - | 4 | 42 | 15 | 27 | 48 |
| 4 Aston Villa | 24 | 14 | - | 6 | - | 4 | 38 | 24 | 14 | 48 |
| 5 Arsenal | 24 | 12 | - | 7 | - | 5 | 38 | 25 | 13 | 43 |
| 6 Everton | 24 | 10 | - | 7 | - | 7 | 31 | 28 | 3 | 37 |
| 7 Wigan | 24 | 9 | - | 6 | - | 9 | 26 | 24 | 2 | 33 |
| 8 West Ham | 24 | 9 | - | 6 | - | 9 | 31 | 31 | 0 | 33 |
| 9 Fulham | 22 | 7 | - | 8 | - | 7 | 22 | 19 | 3 | 29 |
| 10 Man City | 23 | 8 | - | 4 | - | 11 | 41 | 32 | 9 | 28 |
| 11 Hull | 24 | 7 | - | 7 | - | 10 | 31 | 46 | -15 | 28 |
| 12 Bolton | 24 | 8 | - | 3 | - | 13 | 27 | 34 | -7 | 27 |
| 13 Sunderland | 24 | 7 | - | 6 | - | 11 | 25 | 33 | -8 | 27 |
| 14 Tottenham | 24 | 6 | - | 6 | - | 12 | 26 | 31 | -5 | 24 |
| 15 Newcastle | 24 | 5 | - | 9 | - | 10 | 30 | 40 | -10 | 24 |
| 16 Portsmouth | 23 | 6 | - | 6 | - | 11 | 23 | 38 | -15 | 24 |
| 17 Stoke | 24 | 6 | - | 6 | - | 12 | 21 | 38 | -17 | 24 |
| 18 Blackburn | 23 | 5 | - | 8 | - | 10 | 27 | 38 | -11 | 23 |
| 19 Middlesbr. | 24 | 5 | - | 7 | - | 12 | 18 | 35 | -17 | 22 |
| 20 WBA | 24 | 6 | - | 4 | - | 14 | 22 | 44 | -22 | 22 |

## Úrslit, Premier League

**Leygardagin**

| | |
|---|---|
| Stoke-Manchester City | 1-0 |
| Middlesbrough-Blackburn | 0-0 |
| Arsenal-West Ham | 0-0 |
| Aston Villa-Wigan | 0-0 |
| Bolton-Tottenham | 3-2 |
| Fulham-Portsmouth | 3-1 |
| Hull-WBA | 2-2 |
| Manchester Utd-Everton | 1-0 |

**Sunnudagin**

| | |
|---|---|
| Newcastle-Sunderland | 1-1 |
| Liverpool-Chelsea | 2-0 |

## Fergie fegnast

Enn eitt Clean Sheet móti Everton – tað 12. á rað – ber við sær, at Manchester United leygardagin setti nýtt met í enskum fótbólti.

1.122 minuttir eru nú spældir, síðani mótstøðuliðið seinast skoraði móti Manchester United í Premier League, og fram um aðrar var tað hollendski málverjin, Edwin van der Saar, sum fekk stórar rósur frá venjaranum.

- Hetta er eitt framúrskarandi avrik. Eg hevði ilt við at trúgva tí, tá eg las, at seinasta málið, sum er skorað móti okkum í liguni, var móti Arsenal í oktober mánaði.

- Van der Saar gevur frið og tryggleika yvir verjuspælið. Seinastu dystirnar hava vit skift út millum teir aftastu fýra eitt ótal av ferðum. So eg má rósa verjuni og serstakliga málverjanum.

- Hesa ferð høvdu vit eina rúgvu av møguleikum, men vit megnaðu ikki veruliga at avgera dystin. Høvdu vit fingið næsta málið, var allur ivi burtur, men teir stóðu ímóti trýstinum, og gjørdist tað rættiliga strævið hjá okkum, segði Sir Alex Ferguson við ensku miðlarnar eftir dystin.

Starvsfelagi hansara í Everton, David Moyes, var ikki heilt ósamdur í, at sigurin var uppiborin, men hann harmaðist brotssparkið, sum bar sigurin við sær.

- Hatta er eitt av hasum brotssparkunum, sum langt ífrá altí verða dømd. So tað var eitt sindur keðiligt, at hetta skuldi avgera dystin, segði Moyes.

**0**